# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 2. september 2009


# Søgan er góð barlast

**Málskjúttin frá dystinum móti Eysturríki á Tórsvølli heldur tað geva eitt slag av barlast, at úrslitið móti Eysturríki seinast var somikið gott**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk



Bogi Løkin slapp ovast á allar forsíður í Eysturríki fyri knøppum ári síðani. Og sjálvur heldur hann, at tann barlastin kann brúkast positivt hjá føroyska liðnum

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Hóast hann er ein av yngstu monnunum í hópinum, so hevur Bogi Løkin longu vunnið sær status sum fastur maður millum teir fyrstu ellivu hjá Brian Kerr, landsliðsvenjara.

Saman við restini av føroyska landsliðshópinum setti Bogi Løkin klokkan 11 kósina móti Graz í Eysturríki, og hann viðgongur, at talan er um ein sindur serligan dyst.

- Tað er sjálvandi søgan, sum er kring dystin hjá okkum móti Eysturríki. Landskrona í '90 er jú nakað, sum øll kenna til. Men akkurát tað fáa vit ikki brúkt til so øgiliga nógv her og nú. Vit mugu út at fremja eitt gott avrik, og so kunnu vit sjálvandi hava í huganum, at vit móti júst Eysturríki hava prógvað, at tað ber til, sigur Bogi Løkin.

Á Tórsvølli fyri einum ári síðani var Bogi Løkin maðurin, sum skoraði føroyska málið í 1-1 javnleikinum. Javnleikurin var í sjálvum sær nakað, sum sjálvandi fekk sítt rúm í eysturríksku miðlunum, og tað gjørdi ikki søguna verri, at tað júst var sonurin hjá einum av Landskrona-hetjunum, sum skoraði føroyska málið. Men enn er tað so ikki nakað, sum hevur merkt fyrireikingarnar hjá Boga til dystin leygardagin.

- Tað vóru sjálvandi nógvir tíðindamenn, sum ringdu beint eftir dystin í fjør, men higar til hevur telefonin ikki kimað í so máta.

Men tað verður kanska meira eftir dystin leygardagin?

- Tað kunnu vit altíð vóna. Og tað vildi í øllum førum ikki verið so galið, um tað var støðan, sigur Bogi Løkin.

Føroyska ferðalagið fór avstað klokkan 11 í morgun. Umvegis eina millumlending í Billund verður flogið til Graz, og klokkan 19.30 føroyska tíð leygardagin stendur dysturin móti Eysturríki á skránni.



Brian Olsen og Levi Hanssen eru nýggir í hópinum hesaferð. Levi var tó eisini partur av hópinum, sum í mars mánaði vann 2-1 á Íslandi

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Seinkað fráferð

Tað gekk ikki heilt eftir vild, tá føroyska ferðalagið skuldi seta kósina móti Graz klokkan 11 í dag.

Í fráfaringarhøllini vóru boðini nevnliga, at brek var á veðurradaranum á flogfarinum, sum skuldi flúgva til Graz. Heldur enn at bíða, til hesin var umvældur, valdi leiðslan í Atlantic Airways, at bíða eftir flogfarinum úr Keypmannahavn, sum skuldi lenda klokkan 13.45.

Heilt sleptir upp á fjall verða landsliðsspælararnir tó ikki. Alt ferðalagið varð nevnliga boðið niðan á Hotel Vágar at stytta sær stundir.

*-mørk*



# Spæliloyvið neyvan flutt

**FSF-forsetin staðfestir, at tað er ikki upp á tal at viðgera flytingina av spæliloyvinum hjá Christiani Restorff Mouritsen fyri triðju ferð**

Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, avsannar, at tað er sjálvt málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen, sum skal viðgerðast, nú Kappingarnevndin av nýggjum skal hyggja at reglunum um flytingarvindeyga.

- Vit fingu eina áheitan, sum var undirskrivað av 13 feløgunum, og hesa hava vit sjálvandi tikið í álvara. Málið er viðgjørt í starvsnevndini, og vit hava gjørt av, at Kappingarnevndin skal viðgera hetta.

- Men tað merkir ikki, at Kappingarnevndin skal viðgera spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen. Nevndin fer neyvt at greina allar reglur kring flytingargluggan, og tá hetta er gjørt, fáa tey 13 feløgini sjálvandi svar upp á sítt skriv, sigur Høgni í Stórustovu.